## Samgongan stríddist til evstamark

**Alt bendi á, at samgongan stóð sum ein maður um fíggjarlógaruppskotið fyri 2003, tá av tornaði. Men tað var ikki uttan stríð, tí samgongulimirnir máttu arbeiða líka til markið var nátt fyri, at álit skuldi handast løgtinginum**

FÍGGJARLÓG
*Ingi Rasmussen*

Samgongan stríddist heilt til evstamark við at fáa síðstu lutirnir við fíggjarlógini fyri næsta ár upp á pláss.

Fíggjarnevndin skuldi lata løgtinginum álit í málinum hósdagin, men álitið varð ikki komið, áðrenn blaðið fór til prentingar, og meirilutin var heldur ikki nógv fyri at siga nakað um tað.

Tað hevur ljóðað, at samgongulimirnir í fíggjarnevndini ikki vóru samdir um allar lutir heilt til tað síðsta, men sambært Kára P. Højgaard úr Sjálvstýrisflokkinum, varð tað eitt meirilutaálit frá øllum samgongulimunum í fíggjarnevndini, sum varð lagt fram.

Hóast tað mesta var komið upp á pláss, noyddust samgonguflokkarnir kortini at brúka síðstu tímarnar til at fínpussa uppskotið og skriva endaliga tekstin sama dag, sum uppskotið skuldi leggjast fram. Kvøldið fyri høvdu flokkarnir eisini havt sínámillum fund um tølini.

Óteljandi broytingar eru gjørdar til upprunaliga uppskotið frá Karsten Hansen landsstýrismanni, og úrslitið er, at fíggjarlógin verður umleið 90 milliónir krónur lægri fyri 2003.

Sostatt eru fleiri játtanir skerdar ella tiknar burtur. Tað hevur ljóðað, at útbyggingarnar á Drelnesi hava verið í vanda, men eftir øllum at døma er tann játtanin fingin upp á pláss, so ferjulegan verður liðug, tá nýggja suðuroyarskipið kemur.

# Alivinnan heldur andanum

**Stóra norska alifyritøkan Pan Fish liggur í andaleypi, og vandi er fyri, at ringarnir í sjónum breiða seg til føroysku alivinnuna. Stjórin í Vestsalmon og Vestlax er í bíðistøðu, og hann torir onki at siga um møguligar avleiðing fyri størstu føroysku alifyritøkuna**

ALIVINNA
*Ingi Rasmussen*


*Føroysku firðirnir hava havt stóran áhuga hjá norska alirisanum Pan Fish, sum stendur á knøunum*
*(tilvildarlig mynd)*

Partar av føroysku alivinnuni halda andanum í hesum døgum.

Verður Pan Fish avreitt, fóðrað ella bløðgað, eru spurningar, sum fáa stóra ávirkan á eitt nú Vestlax, sum Pan Fish hevur nógv áhugamál í.

Í løtuni eru tað norsku bankarnir, sum halda lív í Pan Fish. Fyritøkan skyldar fimm milliardir norskar krónur og hevur ongan møguleika at gjalda skuldina aftur.

Roknað verður við, at norsku bankarnir eru um at yvirtaka meginpartin av Pan Fish. Í løtuni er líkt til, at ein partur av skuldini, meira enn ein milliard, verður løgd um til partabrøv, og tað merkir, at verandi partaeigarar einans sita eftir við millum 5 og 8 prosentum av partabrøvunum. Sostatt verða tað norsku bankarnir, sum ráða fyri, hvat hendir við ognunum hjá móðurfelagnum í Pan Fish.

### Stór áhugamál

Óvist er, hvat norsku bankarnir ætla, men í løtuni hanga hóttafull skýggj yvir nógvum føroyskum alifyritøkum, tí Pan Fish eigur sín stóra part í teimum.

Í alibrúkum á sjónum kunnu útlendingar bara eiga ein triðing, men í Vestsalmon, sum er á landi, eigur Pan Fish heili 60 prosent. Umvegis Vestsalmon, sum eigur fleiri alibrúk á sjónum, eigur Pan Fish eisini í øðrum alibrúkum. Haraftrat eigur Pan Fish eisini í roykivirkinum Vestlax í Hirtsals, tí Vestsalmon eigur tað virkið burturav.

### Stjórin bíðar

Helst vilja norsku bankarnir hava Pan Fish at halda fram heldur enn at koyra tað av knóraunum. Men við at yvirtaka Pan Fish hava bankarnir nógvar pengar útistandandi, og ein partur skal onkursvegna fáast innaftur. Spurningurin er, hvat bankarnir gera við útlendsku ognirnar hjá felagnum, fyri at fáa nakrar pengar til høldar.

Suni Durhuus, stjóri í bæði Vestsalmon og Vestlax, hevur merkt sær tíðindini um vánaligu støðuna hjá Pan Fish, men alt er so óvist, at hann onki vil siga um støðuna enn.

– Eg vil ikki siga, at eg eri bangin, men vit havi onki frætt úr Noregi, og tí vil eg heldur onki siga, fyrr enn eg veit betur, hvat hendir, sigur Suni Durhuus, sum bara sigur seg hava hoyrt tað, sum verður sagt og skrivað í fjølmiðlunum.

**Støðir**




### Fakta

**Pan Fish í Føroyum**

Pan Fish stríðist fyri lívinum og skyldar umleið 5 milliardir krónur, sum felagið ikki megnar at rinda aftur.
Pan Fish eigur meirilutan av Vestsalmon í Føroyum.
Vestsalmon-group telir 14 alibrúk, smoltstøðir og hagreiðingarvirki.
Tey eru:
Vestmanna, Veslax P/F
Vestmanna, Smoltaling P/F
Kollafjørður, Vestsalmon P/F
Stilli, Vestlax P/F
Svínáir, Vestlax P/F
Vík, Vestlax P/F
Veðranes, Vestlax P/F
Kollafjørður, Vestlax P/F
Funningsbotnur, Norðsmolt P/F
Oyndarfjørður, Vestlax P/F
Oyndarfjørður, Laksá P/F
Fuglafjørður, Alilaks P/F
Viðareiði, Vestsmolt P/F
Árnafjørður, Hellisvað P/F



# Siglingin á Vág og Skálafjørðin í løgtingið

**Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í samferðslumálum, hevur lagt uppskot fyri tingið um at strika siglingina á Vág og millum Havnina og Skálafjørðin. Við at niðurleggja hesar farleiðir ber til at spara sjey milliónir**

SAMFERÐSLA
*Jón Brian Hvidtfeldt*

Tvær av farleiðunum hjá Strandferðsluni, ið løgtingið hevur álagt stovninum at røkja, eru nú aftur endaðar í tinginum. Talan er um siglingina hjá Smyrli á Vág og siglingina inn á Skálafjørðin.

Í eini roynd at spara pengar á samferðsluøkinum hevur Bjarni Djurholm nú lagt uppskot fyri tingið um at strika hesar farleiðir. Í viðmerkingunum til bæði uppskotini sigur landsstýrismaðurin, at endamálið er at fremja eina rasjonalisering av almenna flutningssambandinum.

### Spara sjey mió.

Verða uppskotini samtykt, ber til at spara sjey milliónir krónur um árið í rakstrinum av sjóvegis samferðslukervinum. Í fíggjarlógaruppskotinum fyri næsta ár eru seks milliónir krónur settar av til Skálafjarðarleiðina. Í fjør gav farleiðin 2,8 milliónir í halli, og fyribilstølini hjá Strandferðsluni benda á, at úrslitið í ár verður nakað tað sama. Harumframt er Ternan 1, ið røkir siglingina, 42 ára gomul, dýr í rakstri, og harumframt má leggjast upp fyri, at nýtt skip skal útvegast innan fá ár. Eitt nýtt skip til farleiðina er mett at kosta millum 40 og 60 milliónir krónur.


*Eftir øllum at døma er siglingin millum Havnina og Skálafjørðin skjótt søga. Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í samferðsumálum, hevur lagt uppskot fyri tingið um at niðurleggja bæði Skálafjarðarleiðina og siglingina hjá Smyrli á Vág*

Sum er siglur Smyril ein túr um vikuna á Vág. Verður hesin túrur strikaður, og Smyril í staðin siglir á Drelnes, so ber sambært landsstýrismanninum til at spara 750.000 krónur. Í viðmerkingunum til uppskotið vísir landsstýrismaðurin á stóru útbyggingina av havnini í Vági, ið er neyðug um nýggja suðuroyarskipið skal kunna leggja at bryggju har. Ein íløga, ið er mett at kosta landskassanum 18,5 milliónir.

Verður siglingin á Vág og siglingin inn á Skálafjørðin niðurlagdar, hevur landið bundið seg til at rinda kommununum endurgjald fyri mist havnagjald. Endurgjaldið er havnagjald í fimm ár. Sostatt skal landið gjalda Vágs Kommunu 840.000 krónur í endurgjaldi, gevst Smyril at sigla á Vág. Verður Skálafjarðarsiglingin niðurløgd, skal Nes Kommuna hava 420.000 krónur, Sjóvar Kommuna skal hava 160.000 krónur og Tórshavnar Kommuna skal hava 210.000 krónur í endurgjaldi.

### Veg út á Strendur

Í øðrum av uppskotinum, sum Bjarni Djurholm hevur lagt fyri løgtingið, stendur beinleiðis, at tekur tingið undir við at niðurleggja Skálafjarðarleiðina, so er ætlanin at peningurin í staðin skal nýtast til vegin millum Skálabotn og Strendur.

# Óvissa um hægri útgjald úr ALS

**Framvegis er óvist, hvørt tey arbeiðsleysu fara at fáa meira frá ALS. Uppskotið frá Kristian Magnussen úr Javnaðarflokkinum um at hækka útgjaldið uppí 80 prosent av eini arbeiðaraløn, varð við 3. viðgerð beint aftur í nevnd**

ARBEIÐSLOYSISTRYGGING
*Jón Brian Hvidtfeldt*

Ivasamt er, hvørja lagnu uppskotið hjá Kristian Magnussen úr Javnaðarflokkinum um at hækka útgjaldið úr ALS úr 70 prosentum uppí 80 prosent av eini arbeiðarløn fær. Herfyri varð uppskotið, kanska heldur óvæntað, samtykt við 2.viðgerð í løgtinginum, tí bæði Javnaðarflokkurin og Sambandsflokkurin, umframt samgongutingmaðurin Jenis av Rana, atkvøddu fyri uppskotinum, samtíðis sum nakrir av samgongutinglimunum ikki vóru til staðar í løgtinginum undir atkvøðugreiðsluni. Tí var stórur spenningur um málið, tá tað kom til 3.viðgerð. Úrslitið gjørdist tó, at málið varð beint aftur í vinnunevndina.

Undir 3. viðgerðini í løgtinginum vístu tinglimir m.a. eisini løgmaður á, at tey hildu tað vera óheppið, at løgtingið legði seg út í arbeiðið hjá stýrinum fyri ALS.

Men hesum varð Kristian Magnussen, ið hevur lagt uppskotið fram, ikki samdur í. Hann vísir á, at stýrið, ið er umboðað av arbeiðstakarum og arbeiðsgevarum, hevur ligið »handlingslammað« í samband við henda spurning í fleiri ár, og tí hendir einki.

Herfyri gjørdi stýrið av at lækka inngjaldið í skipanina úr 1,25 prosentum niður í 0,5 prosent. Broytingin kemur í gildi á nýggjárinum. Undir 3.viðgerð førdu tinglimir fram, at tað má vera samanhangur millum inngjald og útgjald, og tí kann tað vera óheppið, at løgtingið ger av at hækka útgjaldið, samtíðis sum stýrið lækkar inngjaldið.

Kristian Magnussen førdi í hesum sambandi fram, at við verandi arbeiðsloysi fer tað at kosta umleið 8,6 milliónir árliga fyri ALS, um útgjaldið verður hækkað úr 70 prosentum uppí 80 prosent av eini arbeiðaraløn. Hann vísti samtíðis á, at var hetta ein so stórur trupulleiki fyri fíggjarstøðuna hjá Arbeiðsloysisskipanini, so kundi inngjaldið lækkast niður í 0,6 prosent, heldur enn 0,5 prosent. Hetta hevði, sambært Kristian Magnussen, givið skipanini umleið 12 milliónir krónur meira í inntøku.

Heini O. Heinesen, formaður í vinnunevndini, segði undir 3.viðgerð í løgtinginum, at tað vísti seg at Sambandsflokkurin tók ikki undir við uppskotinum, tá málið var til viðgerðar í vinnunevndini eftir 1. viðgerð, men síðan atkvøddi flokkurin kortini fyri uppskotinum, tá atkvøðast skuldi við 2. viðgerð. Tí metti hann tað vera rættast at málið varð beint aftur í vinnunevndina. Og tað var eisini ein sambandsmaður, Kaj Leo Johannesen, ið skeyt upp at koyra málið aftur í vinnunevndina.

25 tinglimir, allir flokkar uttan Javnaðarflokkurin, tóku undir við at beina málið aftur í vinnunevndina.

Í fjør vóru 60 milliónir krónur útgoldnar úr ALS til arbeiðsleys, og roknað verður við umleið somu upphædd í ár. Eginognin hjá Arbeiðsloysisskipanini kemur við árslok uppá umleið 480 milliónir krónur.


*- Útgjaldið úr ALS skal hækkast upp í 80 prosent, heldur Kristian Magnussen úr Javnaðarflokkinum. Uppskotið hjá honum er nú aftur endað í vinnunevndini.*

# Andstøðan stendur saman

Teir báðir andstøðuflokkarnir, Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin, ætla sær í felag at leggja fram eitt minnilutaálit til fíggjarlógaruppskotið. Flokkarnir hava kortini hvør sínar viðmerkingar.

Eins og meirilutin í fíggjarnevndini, samgonguflokkarnir, er eisini andstøðan trek at siga nakað um, hvussu teirra álit sær út, áðrenn tað er lagt fram.

Eftir ætlan skuldu álitini til fíggjárlógaruppskotið leggjast fram á tingfundinum seinnapartin hósdagin. Upprunaliga skuldu álitini leggjast fram á tingfundinum mikudagin, men Edmund Joensen, tingformaður, játtaði at leingja freistina til hósdagin. Tveir dagar skulu ganga millum at álitini verða løgd fram, til 2. viðgerð kann vera, og tí kann væntast, at løgtingið fer undir 2.viðgerð av fíggjarlógini fyri 2003, mánadagin í næstu viku.

**jbh**

